VALGREINAR

Gev tónleikinum C-vitaminir

Javnaðarflokkurin hevur sett sømdirnar hjá føroyska tónleikalívinum sum eitt sjálvstøðugt evni í síni valskrá. Velur tú lista C til løgtingsvalið, ert tú beinleiðis við til at stuðla føroyskum tónleikarum.

John Johannessen,
Valevni Javnaðarfloksins í Suðurstreymi

Teitur Lassen, Eivør Pállsdóttir, Guðrun Sólja Jacobsen, Týr, Gunnar Mikkelsen. Hesi eru øll nøvn, sum í farna ári hava víst umheiminum dugnaskapin hjá føroyskum tónlistafólki. Dugnaskapin í einum tónleikaumhvørvi, sum er ógvuliga ríkt uppá talentir. Men sum samstundis er fátækt í pengum og umstøðum.

Í Javnaðarflokkinum fegnast vit um dugnasemið. Samstundis ásanna vit, at brúk er fyri betri umstøðum hjá føroyskum tónleikanum at menna síni evni. Tí hava vit sett okkum fyri at brúka orku uppá at vera við til at styrkja hesa listagrein.

Stuðla útgávu

Eitt ríkt tónleikalív kann eisini gerast ein gevandi útflutningsvøra. Men tað er bæði kostnaðarmikið og torført hjá føroyskum tónleikarum at útgeva tónleik, eisini tá tað bert snýr seg um føroyska heimamarknaðin. Tí á einum so lítlum marknaði, sum tí føroyska, er tað nærum ógjørligt at fáa figgjarligt avkast burtur úr útgávunum.

Vøran er kortini fyrsta floks, og kundi saktans verið seld uttanlands. Men trupult er at koma á marknaðin, og tá útgávan í Føroyum ikki lønar seg, er trupult at fáa figging til at røkka útlendska marknaðin.

Tí heldur Javnaðarflokkurin tað beinleiðis vera neyðugt at seta pening og orku av til at stuðla føroyskari fløguútgávu uttanlands. Tað er neyðugt at hjálpa til við fíggingini. Og tað er eisini umráðandi á aðrar hættir at hjálpa tónleikarunum at bróta ígjognum á risastóra altjóða marknaðinum.

Góður vinnumøguleiki

At stuðla føroyskum tónleiki kann beinleiðis vera við til at styrkja føroyska búskapin. Tí við útflutningi av tónleiki, kunnu vit eisini skapa ein nýggjan vinnuveg.

Tónleikaídnaðurin úti í heimi er ein figgjarligur risi. Og tí kunnu føroyskir tónleikarar við røttu marknaðarføringini og nakað av hepni, útvega nýggj arbeiðsplkáss og møguliga eisini eitt íkast til føroyska búskapin.

Samstundis er altjóða marknaðurin ein góður møguleiki hjá føroyskum tónlistafólkum at menna seg enn meira.

Gev tónleikinum C-vitaminir. Atkvað fyri lista C tann 20. januar.

Hol í Suðuroynni

Finnleif Guttesen
Valevni í Suðuroy

Nógv er tosa og alt ov lítið er gjørt fyri at seta hol á tunnil millum Hov og Øravík, sum kann gerast uppá umleið eitt ár. Nú, linjuføringin kann broytast og kostnaðarætlanin er á sama støði, er bert eftir at fara í gongd.

At draga arbeiði út yvir fleiri ár er hol í høvdi, tí tað ger alt dýrari. Avtala má tí gerast við arbeiðstakarin um at gjalda yvir fýra til seks ár.

Komandi samgonga má seta hesa verkætlan í gongd beinanvegin og somuleiðis hava tunlar til Hvalba og Fámjin við í framtíðarætlanum.

Kreppuhjálp frá dønum tíggjunda hvørt ár í meðal

Edmund Joensen

Sambært Útvarpi Føroya er í hesum døgum gjørd ein kanning, har fólk verða spurd hvussu tey vænta at komandi árið fer at roynast fíggjarliga. Tey flestu vænta afturgongd.

Tíggjunda hvørt ár í meðal seinastu 50 árini, hava Føroyar havt álvarsligar fíggjarligar trupulleikar. So álvarsligar, at danski staturin eftir umbøn úr Føroyum hevur veitt serliga fíggjarliga hjálp.

Hetta framgongur í greinarað hjá skilamanninum Rolf Guttesen fyri einari tíð síðan, har hann eisini letur føroyskar loysingarmenn úr, spilnæknar.

Greinirnar "Gestsins eyga blátt" eru serliga avdúkandi.

Rolf minnir á sorgarleikin í 1951-52 tá "Okkara Banki" fekk peningainnspræning tvær ferðir frá dønum, og hann minnir eisini á fleiri aðrar fíggjarligar sorgarsøgur:

"Men (banken) løb ind i nye vanskeligheder i 1956 som følge af tab på store engagementer med hvalfangstselskaber. Efter opfordring af Viggo Kampmann blev krisen denne gang afværget i stilhed ved nationalbankens mellemkomst. Det var opfattelsen, at en 3. rekonstruktion ville skabe så megen turbulens omkring banken, at dens eksistens ville blive truet".

- Longu aftur í 1962 átók Nationalbankin sær eina serliga »føroyska« uppgávu. Størsta vinnulívsfyritøka í Føroyum »J. F. Kjølbro« í Klaksvík var um at fara á heysin. Teir høvdu mist nógvar pengar uppá fiskiroyndir í Eysturgrønlandi.

- Í 1974/75 var likviditetskreppa bæði í bankunum og í landskassanum. *»Igen ydede Nationalbanken støtte, dels til bankerne direkte, dels ved genbelåning af Landsstyrets kreditter i bankerne.«* Og ikki óvæntað bleiv hjálpin av uppgjørdum, korkalittum tjóðveldismonnum uppfatað sum »kolonialur ágangur og hjálandapolitikkur«, sum ein oddagrein í 14. skrivaði."

"Ikki minst Fíggingargrunnurin fra 1992, sum við næstan 3 milliardum bjargaði bankunum, var stór hjálp í neyðini. Og skera vit alt svass burtur, so virkaði hann sum ætlað: Sum ein hjálp at fáa føroyska samfelagið aftur á føtur." sum Rolf sjálvur málber seg.

Onnur fíggjarlig tiltøk

Annars nevnir Rolf eina reð av donskum tiltøkum, øll til frama fyri Føroyar. Onnur kundu eisini verið nevnd. Umframt Marsjalhjálp til Tjaldrið og SEV er talan m.a. um Realkredittin til endurnýggjan av fiskiskipaflotanum í 50-60-unum og fram eftir, Fiskaríbankan, Investeringsfonden for Færøerne, 60 milliónagrunnin, Egnsudviklingsstøtten, Framtaksgrunnin o.s.fr.

Felags fyri allar kreppurnar eru, at tær eru sera nær tengdar at loysingarmonnum. Felags fyri allar kreppuloysnirnar er eisini, at tær eru loystar av dønum, ella av sambandsmonnum í tøttum samstarvi við teir. Ein triðji felagsnevnarin er, at hvørja ferð danir hava hálað okkum upp úr runundýkinum, so hava loysingarmenn bert ótøkk og ókvamisorð at bera dønum.

Hava vit lært nakað ?

Spurningur er so, hvat vit føroyingar, og ikki minst loysingarmenn, hava lært av øllum hesum kreppum.

Allar flestu føroyingar eru samdir um, at vit eru væl á veg út í eina nýggja kreppu. Hetta hendir aftaná, at loysingarmenn aftur hava havt valdið í Føroyum í 6 ár. 6 tey bestu árini í Føroya søgu (metstórar fiskanøgdir, methøgir fiskaprísir, rímuligir orkuprísir, metlág renta, ongin skuld aftaná saneringarnar við donskum peningi). Statistiskt áttu teir undir vanligum umstøðum at megnað at hildið skútuni flótandi í 10 ár, og sjálvandi nógv longur undir góðum umstøðum.

Statistikkur sigur ikki allan sannleikan.

Fíggjarpolitikkurin hjá Tjóðveldismonnum meira enn trýfaldaði eftir 4 árum føroysku nettouttanlandsskuldina til 9 milliardir krónur í 1988. Hetta legði føroyska samfelagið í "respirator" í fleiri ár. Danir hildu "respiratorinum" gangandi til fyrst í nítiárunum, og sprændu síðan 3 milliardir krónum inn í føroyska samfelagið, ein stóran part sum eyka gávu umframt blokkin, og restina sum bíligt lán.

Fer søgan at endurtaka seg

Hesaferð hevur fullveldislandsstýrið hækka fíggjarlógina við umleið 1200 milliónir um árið. Yvirskotið á landskassaroknskapinum, var uppímóti 500 milliónum í 1998, tá ið loysingarlandstýrið kom framat. Tað verður eftir øllum at døma til eitt undirskskot uppá 2/300 milliónir siga framrokningar gjørdar undir viðgerðini av fíggjarlógini 2004. Grannskoðanarvirkið Rasmussen og Weihe hava um sama mundi gjørt kunnugt, at skattatrýstið er eitt tað hægsta í Europa, Hesir veruleikar geva allar góðar grundir til at skunda undir útskrivan av vali.

Tað er satt, tá Sambandsflokkurin vísur á, at tað altíð fellur í hansara lut at rudda upp eftir loysingarmonnum. Tað hevði verið reyp, um vit ikki viðurkendu, at hetta bert var gjørligt saman við dønum.

Mítt ynski er, at Sambandsflokkurin hesa ferð sleppur at rudda upp eftir 6 árum, og ikki eftir 10 áðrum. Tá er samlfelagið alt ov illa farið, og tá er eisini vandi fyri at higar til nýttu bjargingartólini kanska ikki eru tøk.

Vinnan skal hava greiðar og støðugar karmar

Malan Johansen
Valevni hjá Sjálvstýrisflokkinum í Suðurstreymi

Rækjuvinnan bíðar, tí hon vónar at fáa studning úr landskassannum. Politikarnir hava ikki meldað greitt út, um teir fara at veita studning ella ikki. Í staðin fyri at lata rækjuvinnuna vera í einari biðistøðu, eiga politikararnir at gera greitt beinaveg, at studningur ikki verður veittur. Um hesi boð vóru greið, og komin beinavegin, hevði rækjuvinnan longu verið í holt við at funnið aðrar loysnir.

Fyri nøkrun fáum árum síðani var harður ágangur frá fiskivinnuni á politikararnar, um at fáa studning til endurnýggjan av fiskiflotanum. Vinnan hótti við at einki nýtt skip kom til landið, um ikki vinnan fekk studning. Aftaná rúma tíð góvu politikararnir at enda greið boð um, at eingin studningur varð veittur. Síðani fiskivinnan fekk hesu greiðu boð, er júst tað øvugta hent. Fleiri nýggj og stásilig skip eru komin til landið, uttan studning til endurnýggjan.

Vinnan dugir sjálv

Eru karmarnir greiðir og støðugir, finnur vinnan sjálv út av, hvussu hon skal tillaga seg umstøðunum, sum alla tíðina broytast. Og tað er eisini uttan iva vinnan sjálv, sum dugir best at finna út av, hvussu hon skal tillaga seg, og ikki politikararnir.

Tillagingin kann vera pínufull, men studningur er ikki svarið upp á tað. Studningur hevur við sær at tað ikki er neyðugt hjá vinnuni at laga seg til broytta umstøðurnar beinanveg, so sum lægri rækjupris ella hægri oljupris, og tí verður vinnan ikki kappingarfør. Úrslitið verður, at øll vinnan í síðsta enda fer fyri bakka. Hendir tillagingin beinanvegin, er størri møguleiki fyri at vinnan yvirlivir, og harafturat kemur styrkt út úr kreppuni.

Við einum sterkum sjálvstýrisflokki á tingi fáa vit eina sterka vinnu. Set kryss við lista D

VALGREINAR

Tá 240 millióni í avlopi á fíggjarlógini 2003

Johan Dahl
Løgtingsmaður fyri Sambandsflokkin

Blivu til minus 10-20 milliónir í halli – og endaðu við at blíva 160 milliónir í gjaldsførishalli aftan á at avdráttir vóru goldnir

Tað var so endin á tí sokallaða fullveldisplitikkinum, sum tá hesin miseydnaðist aftur, bleiv til sjálvstýrispolitikk, har heimastýrislógin skuldi tømast, sum síðani at enda bleiv til »sjálvbjargnings-politikk«

Tað gongur við fullari ferð framá, hevur formaður Tjóðveldisfloksins ført fram.

Jú so sannliga gongur tað framá - við fullari ferð - út av eggini enn einaferð.

Bremsurnar vóru ongantíð til staðar í fullveldisbussinum hjá slitnaðu samgonguni, og teir sóu ongantíð skógin fyri berum trøum.

Tíverri vil onkur ivaleyst siga - tíbetur vilja onnur siga.

Eykajáttan oman á eykajáttan, var prísurin fyri eina sera undirmetta fíggjarlóg fyri 2003, - ella rættari orsakað av kreativari bókføring, sum framd var av fráfarnu samgongu, hvat viðvíkur fíggjarlógini fyri 2003.

Teir hildu á at sminka líkið, til og við seinasta dag í Løgtinginum, tá teir enntá ætlaðu UTTAN HEIMILDIR, og enntá uttan fíggjarnevndarviðgerð at snýta 4 mio ígjognum,- í enn einum politiskum rossahandlið við Kára P. Højgaard.

Og disse regeredes vi af.

Um tað verður sum Sambandsflokkurin vil og vónandi sum tit eisini vilja tað, - so er ábyrdgarleysi fullveldispolitikkurin (ella hvat tað nú einaferð skal kallast) av á hesum sinni.

Allir føringar við valrætti hava nú aftur møguleikan fyri at velja:

- um teir áhaldandi vilja hava sirkus - og framhaldandi ábyrgdarleysan politikk førdan
- ella vilja hava veruligan realpolitikk førdan
- ein politikk, sum gagnar ungum sum eldri
- ein politikk, har fólkið og fólksins framhaldandi vælferð verður sett í hásætið
- ein politikk, har vinnulívið fær góðar og tryggar karmar at virka undir
- ein politikk, sum vil virka fyri at tú hvønn dag vil gleðast at fara til arbeiðis, tí tað fer at loysa seg at ýta og síðan nýta.
- ein politikk, har normaliserað viðurskifti aftur verða við restina av ríkisfelagskapin.
- ein politikk, sum mennur okkra land og okkara fólk á øllum økjum.
- ein politikk, sum verjir øll okkara vunnu rættindi, tað verið seg bæði vinnuliga og ríkisrættarliga.
- ein politikk ,sum stig fyri stig vil skapa vøkstur og menna inntøkumøguleikar okkara, so vit gerast alt meira fíggjarliga sjálvbjargin.

Um tað er tað, tú eisini vil, so er Sambandsflokkurin tín flokkur.

Vert er eisini at hava í huga, at tað er bara ein flokkur eftir her á landi, nevnliga Sambandsflokkurin, sum framhaldandi vil verða í ríkisfelagsskapi við Danmark og Grønland og verja og áhaldandi betra hendan felagsskapin og okkara rættindi innan hendan.

Set kross tín við SAMBANDSFLOKKIN tann 20 januar 2004, so er tú í tryggum hondum.

Barnaansingarpolitikkur í tí góða samfelagnum

Eyðgunn Samuelsen
valevni Javnaðarfloksins í Norðoyggjum

Eitt vælferðarsamfelag sum okkara eigur at raðfesta børnini høgt. Javnaðarflokkurin hevur í Klaksvíkar býráð arbeitt av øllum alvi fyri at tryggja at øll børn í kommununi fáa barnaansing.

Við nýggja útibarnagarðinum, ið opnar í Haraldssundi fyrst í januar 2004, eru vit væl á veg at røkka hesum málsetningi.

Øll foreldur vita, at tað er kostnaðarmikið at hava børnini í barnaansing. Eru børnini fleiri, er tað spurningurin um arbeiðsinntøkan hjá øðrum av foreldrunum røkkir til meira enn útreiðslurnar til barnaansing. Hetta meta vit í Javnaðarflokkinum er ein skeiv gongd, tí vit arbeiða fyri at øll skulu hava javnbjóðis rættindi til barnaansing, tí má henda gongd steðgast !!

Javnaðarflokkurin vil eftir løgtingsvalið fáa lógina um barnaansing broytta, soleiðis at øll foreldur,ið hava tvey ella fleiri børn í ansing, fáa systskinaavsláttur.

Tað góða samfelagi hevur ein familjupolitik ið setir børnini í hásæti, vil tú eisini at okkara børn hava bestu korðini, so velir tú Javnaðarflokkin til løgtingsvalið 20 januar.

Hevur familjan fingið tað lættari ?

Helgi Abrahamsen
valevni Sambandsfloksins

Hvørja ferð tá val nærkast, eru røddir frammi sum siga, at nú skal fjálgast um føroysku familjurnar. Vit skulu hava barsilspengar, stuðul til at seta búgv, fleiri barnaansingarpláss o.s.fr. Hetta eru alt góðir tankar, sum fáir føroyingar munnu hava nakað ímóti.

Men heldur enn at geva lyfti, ið ikki kunnu haldast, lat okkum so hyggja eftir veruleikanum sum hann sær út. Hvussu er støðan í landinum, og hvat kunnu vit út frá tí veruleikanum vænta okkum í komandi tíðum ?

Alt skuldi bera til

Í 1998 varð nógv sagt og skrivað um sjálvberandi búskap og fullveldi. Landsstýrið skuldi kuta meira enn eina milliard burturúr føroyska búskapinum, uttan at føroyska familian skuldi fáa tað verri av teirri orsøk.

Øll áttu longu tá at skilt, at hetta bar ikki til. Men hvat skal Palleba trúgva, tá politikarar, búskaparfrøðingar og onnur lærd fólk siga, at hetta verður eingin trupulleiki ?

Og so fór fyrst ein reklamuherferð í gongd, og síðani vóru samráðingar við donsku stjórnina. Øll minnast vit, hvussu tað endaði, so tað er ikki neyðugt at endurtaka her. Men úrslitið fyri føroysku familjuna var, at 366 mió.krónur vórðu tiknar burturúr landskassanum um árið frá 2002, og í 2003 bleiv blokkstuðulin eisini "fastfrystur", fyri at tað veruliga virði skuldi minka uppaftur meira.

Tá árið 2004 er liðugt, hava hesi bæði undanfarnu landsstýrini soleiðis sent umleið 1,2 milliardir krónur av landinum. Og hvør skal gjalda ? - Tann føroyska familian !

Fyrstu ávaringarnar

Tá fíggjarlógin fyri 2004 var til viðgerðar í løgtinginum fingu vit tær fyrstu ávaringarnar:

- Hægri inngjald til barsilsskipanina
- Lægri útgjald úr barsilsskipanini
- Lægri rentustuðul fyri sethúsalán
- Avgjøld á húsarhaldsvørður o.s.fr.

Hetta eru bara tær fyrstu ávaringarnar, meðan tíðirnar enn eru so nøkunlunda góðar.

Samgonguflokkarnir hava víst á, at familjurnar hava fingið ein skattalætta, men sambært fíggjarlógaruppskotinum fyri 2004, skuldi landskassin í ár hava meira inn í avgjøldum og lækkaðum rentustuðli, enn hann misti við skattalættanum. Hetta merkir heilt einfalt, at Palleba skal gjalda meira.

Hetta er bara byrjanin, og tí eigur veljarin ikki at svølgja øllum vallyftum frá hesum flokkum, tá teir lova at fjálga um familjuna.

- Og gloym so ikki, at um somu flokkar finna saman aftur eftir valið, so er teirra mál at lækka blokkstuðulin uppaftur meira. - Og Palleba skal gjalda.

Føroyar, nýggjan bygnað

Súsanna Dam

Orsøkirnar kunnu vera so mangar til at ein ynskir broytingar í førdum politikki. Eftir míni metan er ein av teimum týdningarmiklu orsøkunum júst nú, hendan, at við verða at læra okkum at virða eina framkomna fólkaræðiliga rættarskipan, so sum vit kenna tað í londunum við ynskja at samanberast við.

Núverandi "Hill Billy" system, har "hetjubrøgd og avriksverk" kunnu nýtast sum umbering fyri brot av øllum handa slagi, og sum annars mest er kent frá fjarskotnum fjallasamfeløgum í USA, kann á ongan hátt góðtakast sum galdandi háttalag.

Í einogtjúgundu øld ábyrgdast hvør einstakur sínum gerðum, uttan mun til hvar í hierakinum ein flýtur ella hvussu kreativar frágreiðingarnar eru. Áður enn hendan broytingin verður framd, eru vit ikki før fyri at skipa eitt samfelag, har hvør einasti borgari kann líta á, at øll eru líka fyri lógini.

Kennir tú ótrygd ella ónøgd við verandi umstøður, er einasta loysn at seta ein sterkan sambandsflokk á ting, tí hann vil stríðast fyri at gera Føroya til eitt framkomið land at liva í.

Tíðin er komin

…til at javnaðarhugsjónin aftur fær sterka ávirkan á føroyska gerandisdagin og føroyskan politikk

Kári Mortensen
valevni hjá Javnaðarflokkinum í Suðurstreymoy

Í míni fyrstu blaðgrein í valstríðnum má eg allarfyrst siga, at eg eri errin av, at Suðurstreymoyar Javnaðarfelag hevur sett meg á teirra vallista. Táið eg havi sagt ja at vera við so merkir tað eitt ja til saman við øllum hinum at fáa so nógvar atkvøður sum yvirhøvur gjørligt til javnaðarlistan.

Helst er tað so, at tá ið tað ræður um mín persón, so kenna nøkur meg frá ítróttinum, onnur frá skúlaverðini men fá kenna míni politisku motiv.

Tí hendan stutta staðfestingin:

Eri 49 ára gamal og havi síðani 1984 búð í Havn.

Eri útbúgvin í biokemi og matematikk á universitetsstigi og havi arbeitt á privatum virki, Fiskirannsóknarstovuni, Heilsufrøðiligu Starvsstovuni og seinastu 15 árini sum lærari á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði.

Í frítíðini havi eg verið aktivur í hondbólti. Verið formaður í VÍF, nevndarlimur við ábyrgd av millum annað landsliðum í HSF í 6 ár og nevndarlimur í Neistanum í 4 ár.

Havi sum so nógv onnur altíð havt áhuga fyri politikki og javnaðarhugsjónin hevur altíð passa væl til míni sjónarmið um samfelag og samfelagsviðurskifti.

Skráin hjá Javnaðarflokkinum til hetta valið er fjølbroytt og væl sett saman.

Eg fari í komandi stuttum blaðgreinum at nema við evnir, sum hava mín áhuga og sum helst kunnu røkjast betri enn nú. Mítt grundsjónarmið er, at lyklaorðið í øllum forum er kvalitetur.

Tíðin er aftur komin til at javnaðarhugsjónin fær sterka ávirkan á føroyska gerandisdagin og føroyskan politikk.